**Endurlýsing:**

# Starv sum lønarumsitari

*Av tí at ov fáar umsóknir vóru til starvið sum lønarumsitari til Fíggjardeildina á Strandfaraskipum Landsins, tá freistin var úti, verður starvið hervið lýst leyst av nýggjum*

Okkara dugnaligi lønarumsitari hevur sagt upp og fer í annað starv. Tískil verður søkt eftir lønarumsitara/skrivstovufólki til Fíggjardeildina á Strandfaraskipum Landsins, at byrja skjótast gjørligt.

**Starvið**
Tann, sum settur verður, skal tryggja eina effektiva umsiting av lønarútreiðslunum og skrásetingum á Strandfaraskipum Landsins.

**Høvuðsuppgávurnar eru:**
- Skráseting og avstemman av tímaseðlum o.l.
- Viðlíkahald av starvsfólkadátabasu
- Umsiting av sáttmálum við fakfeløg
- Samstarv og samskifti við: Starvsfólk og deildarleiðarar á fyritøkuni Fakfeløgini Fíggjarmálaráðið/Lønardeildina
- Útgjalding av lønum o.ø.
- Tryggja at lønarútreiðslurnar verða skrásettar á rætt endamál og stað
- Uppseting av lønarhagtølum
- Inntøpping og bóking av bókhaldsskjølum
- Avstemming av bankakonti
- Avgreiða fyrispurningar frá kundum

Annar týðandi partur av starvinum er at samstarva við Starvsfólkadeildina um at loysa felags uppgávur.

**Førleikakrøv**
- Skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Kunnleiki og royndir í Navision fíggjarstýringsskipanini og Løtt Løn
- Kunnleiki og royndir í Microsoft Office forritunum
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga
- Góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálaráðið og Starvsmannafelagið, og verður lønt í lønarflokki 4.

Arbeiðsstaðurin er í løtuni Yviri við Strond 4 í Tórshavn. Frá 1. januar 2008 er arbeiðsstaðurin á Tvøroyri.

**Uppgávurnar hjá Fíggjardeildini**
Høvuðsuppgávan hjá Fíggjardeildini er at veita leiðsluni í fyritøkuni eina úrslitagóða búskaparfyrisiting, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna búskaparstýringina hjá fyritøkuni.

**Aðrar høvuðsuppgávur eru:**
- Fyriskiping av roknskaparverkinum
- Uppseting av fíggjarætlanunum
- Roknskaparlig skráseting
- Roknskaparframløga
- Játtanareftirlit
- Lønarfyrisiting

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum og møguligum viðmælum skal sendast til:

Strandfaraskip Landsins
Stílað: Starvsfólkadeildin
Postrúm 88
FO-110 Tórshavn

Umsóknin skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi hósdagin 22. mars 2007 kl. 12.00.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Jógvan Rubeksen, fíggjarleiðara, á tlf. 343021 ella

Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, og hevur sum endamál at nøkta landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Strandferðslan umsitur 29 farleiðir (7 Oyggjaleiðir og 22 Bygdaleiðir). Talið á flutningsførum er 8 ferjur og 40 bussar. Samlaða talið av starvsfólkum svarar til 120 ársverk.

STRANDFARASKIP LANDSINS

sansir.fo

